


*Hóast tap í báðum dystum, hevur 19 ára gamli Høgni Eysturoy víst máltev við at skora móti bæði Víkingi og NSÍ*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

# Alt er opið

**LØGMANSSTEYPIÐ** EB/Streymur hevur møguleika at koma í fjórðu steypafinaluna á rað. Men fyrst skulu teir basa B36 í hálvfinaluni, og tað kann gerast trupult. Báðir venjarnir vænta ein javnan dyst hóskvøldið, har dagsformurin verður avgerðandi

Ólavur Øre Hansen

Seinastu árini hevur EB/Streymur staðið seg sera væl í steypakappingini. Seinastu trý árini hava sundalagsmenn verið í finaluni um Løgmanssteypið. Teir vunnu kappingina í 2007 og 2008, meðan Víkingur foraði teimum í at vinna steypið til ognar í fjør.

Spurningurin er so, um EB/Streymur skal koma í finaluna um Løgmanssteypið fjórða árið á rað, ella B36 klárar at steðga sundalagsmonnum, eins og teir gjørdu í fyrsta umfari av Vodafonedeildini í ár. Fyrri hálvfinaludysturin verður spældur í Gundadali í annaðkvøld kl. 18.30.

**Megna sundalagsmenn at koma í finaluna fjórða árið á rað, ella klárar B36 at steðga teimum, eins og teir gjørdu í fyrsta umfari av Vodafonedeildini**

### Ymiskar fortreytir

Eftir eina flúgvandi byrjan uppá landskappingina, har B36 millum annað vann á EB/Streymi, so hava teir hvítu og svørtu úr høvuðsstaðnum, so at siga mist flogið. Liðið hevur ikki vunnið ein dyst síðani í triðja umfari, og sunnudagin tapti B36 heili 5-1 móti NSÍ í Gundadali.

Meðan formkurvan hjá B36 er dalandi, so gongur tað betur hjá EB/Streymi. Eftir eina skala byrjan uppá kappingina, gongur nú betur hjá sundalagsmonnum, sum hava vunni seinastu tveir dystirnar í Vodafonedeildini.

### Dagsformurin avgerð

Hóast formkurvan hjá B36 og EB/Streymi peika í hvør sín rættning, so meta báðir venjarnir at talan verður um ein javnan dyst, har dagsformurin verður avgerðandi. Tískil er tað týdningarmikið sambært venjarunum hjá B36 og EB/Streymi, at teirra lið er væl fyrireikað til uppgávuna. Tað ræður um at fáa eitt so gott útgangsstøði innan returdystin í Sundalagnum.

Lagt er upp til eina spennandi uppgerð millum B36 og EB/Streym, tá tey skulu spæla fyrru hálvfinaluna í Gundadali hóskvøldið kl. 18.30.

*post@sosialurin.fo*

# Grannar bresta saman

**LØGMANSSTEYPIÐ** Tað er lagt upp til eitt brak av einum dysti, tá ÍF og Víkingur bresta saman í fyrra hálvfinaludystinum í kappingini um Løgmanssteypið hóskvøldið. Umframt at talan er um hálvfinaludystir, so er talan eisini grannauppgerð millum tvey formsterk lið, og tað ger ikki dystin minni spennandi

Ólavur Øre Hansen

Tað verður uttan iva ein spennandi dystur millum tvey lið, sum standa seg væl í Vodafonedeildini í løtuni. Fuglfirðingar vunnu í síðsta landskappingardysti á HB, meðan Víkingur vann truplan útidyst í Vági. Góða gongdin hjá ÍF og Víkingi sæst aftur á stigatalvuni, har Víkingur er nummar tvey og ÍF nummar trý.

Tískil er lagt upp til eina spennandi og intensa grannauppgerð, millum tvey formsterk lið, sum vilja gera alt fyri at vinna dystin. Av tí sama verður tað dagsformurin sum kemur at avgerða hvat av liðunum fær betri útgangsstøði innan returdystin í Sarpugerði 8. juni.

### Ikki tapt í Fuglafirði

ÍF og Víkingur hittust eisini í hálvfinaluni í steypakappingini í fjør, tá felagsliðið úr Gøtu og Leirvík vann báðar dystirnar, áðrenn teir í finaluni vunnu á EB/Streymi. Sostatt hava víkingar góð minnir frá Fuglafirði, har teir higartil hava havt gott tak á ÍF, tá teir hava spælt á Fløtugerði.

Vikingur er enn eitt ungt lið, so at skilja, at felagið hevur bert gott og væl tvey ár á baki. Men enn hevur felagsliðið úr Gøtu og Leirvík ikki tapt í Fuglafirði, hvørki í lands- ella steypakapping. So er spurningurin um Víkingur klárar at halda fast í góðu gongdini á útivølli móti fuglfirðingum.

### Kunnu fáa hevnd

Tað er eingin ivi um, at fuglfirðingar eru uppsettir til dystin hóskvøldið. Tað ræður um hjá ÍF at hevna tapið í hálvfinaluni í fjør, og tað gerst bert við at vinna móti Víkingi í hálvfinaluni. Tí skulu fuglfirðingar hava eitt gott útgangsstøði innan returdystin.

Hóast fuglfirðingar kanska ikki hava hagtølini við sær í heimadystum móti Víkingi, so hava fuglfirðingar í ár víst,



*Súni Olsen hjá Víkingi, tykist vera í topp-formi í løtuni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

at teir í mun til undanfarin ár, hava eitt sera serkt lið. Tað varð staðfest sunnudagin tá teir vunnu á oddaliðnum HB, og tað hevur einki annað lið megna í Vodafonedeildini higartil.

So er spurningurin bara, hvussu leikur fer fram, tá ÍF og Víkingur bresta saman á Fløtugerði hóskvøldið kl. 18.30.

*post@sosialurin.fo*